# Bygdarráðsfundur  (stytt fundarsamtykt)

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** **10-07-2017 kl. 18.30**

Á fundi: Janus Thomsen

Trúgvi Gudmundarson

Magni Bertholdsen

Niels Jacob Thomsen

Eir J. Norðberg

Gunnhild Mortensen

Niels Olaf Eyvindsson

Skrivari: Janus Thomsen

1. **Umsókn um stuðul til heilsufremjandi átak frá Krabbameinsfelagnum.**
   Søkt verður um kr. 5.200,00,-  Samtykt var einmælt at stuðla við kr. 5.200,00

2. **Innkomin boð uppá Jørð til at heysta 2017.**
   Samtykt við 6 atkvøðum fyri at lata Støðlarnar matr. 390f og í Sondunum mtr. 145a til Kenneth Eyvindson, sum hevði hægstu boð.

3. **Val av umboðum í Tilbúgvingarnevnd- og bólk hjá Tvøroyrar Kommunu.**
   Einmælt samtykt at velja Claus Olsen og John Hammer í tilbúgvingarnevndina. Í Tilbúgvingarbólkin blev einmælt samtykt at velja John Hammer.

4. **Kunning um hvørji mál eru beind í nevnd síðani síðsta fund.**

   **Trivnaðarnevnd: 04-07-2017**

   - **Innkomin tilboð uppá rutsjibanar til dagstovnin.**
   - **Skriv viðv. bílegging av leikum v.m. til dagstovnin.**
   - **Ikki alment – 1 mál**

**Vega og havnanevndin: 04-07-2017**

- **Skriv frá Suðuroyar Norðara Bjargingarfelag.**
- **Asfalt á Nýggjaveg og tún/veg hjá borgara.**

**Fíggjarevnd: 06-07-2017**

- **Innkomin tilboð uppá rutsjibanar til dagstovnin.**
- **Skriv viðv. bílegging av leikum v.m. til dagstovnin.**
- **Skriv frá Niels Olaf Eyvindsson til Fíggjarnevndina.**
- **Asfaltering (havnalag í Nesi, Nýggivegur og tún/vegur hjá borgara.**
- **Ikki almenn – 2 mál.**

5. **Kunning um málsviðgerð síðani síðsta fund.**
   **Trivnaðarnevnd: (framløga Eir J. Norðberg):**
   - Einmælt samtykt at taka av tilboðnum frá Alval uppá rutsjibanar.
   - Viðvíkjandi skrivinum um bílegging av leikum v.m. til dagstovnin og tilboð frá Innspark uppá skrivstovuinnbúgv v.m. so mæla Trivnaðarnevndin og Fíggjarnevndin til at samtykkja uppskotið.
     Einmælt samtykt.
   - Kunnan um um hátíðarhald í samband við yvirtøku av dagstovninum Brosið.
     Einmælt samtykt.

   **Vega og havnanevndin: (framløga Trúgvi Gudmundarson)**
   - Einmælt samtykt, at leggja heitt asfalt á økið á havnalagnum í Nesi uttan fyri hølini hjá Suðuroyar Norðara Bjargingarfelag, um nakað er til avlops frá dagstovninum.
   - Viðvikjandi skrivi frá borgara um at leggja asfalt á túnið fyri kommununar rokning. Samtykt við 5 atkvøðum fyri at vísa til bygdaráðssamtyktina frá 2014 um at kommunan ikki asfalterar tún.
   - Viðvíkjandi ábøtur ymsastaðni á vegnum í sóknini, so mælir Vega- og havnanevndin at leggja oljugrús á eitt strekki á Nýggjaveg, vegin í Garðsenni og tilkomuvegin til matrikkul 197b, 129b og 196.
     Einmælt samtykt.

   **Tekniska nevnd: (framløga Niels Olaf Eyvindson)**
   - Kunnað varð um málsviðgerð í sambandi við byggiloyvi.
   - Eisini varð kunnað um vatnleiðinginia í sóknini umframt rottutýning. Nevndin arbeiðir víðari við hesum.
   - Byggiloyvi matr. nr. 131c. Samtykt varð at taka hetta málið við.

Tekniska nevnd og byggifrøðingur hava viðgjørd innsenda tilfarið og mæla til at geva byggiloyvi útfrá hesum. Einmælt samtykt.

**6. Ikki almenn mál.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl.21.45

Janus Thomsen Trúgvi Gudmundarson Magni Bertholdsen Niels J. Thomsen

Niels Olaf Eyvindsson Gunnhild Mortensen Eir J. Norðberg.